# Ongin avgerð tikin um Suðuroynna og Sandoynna

**Nú Farmaleiðir verða einskildar, er ongin endalig avgerð tikin um, hvussu farmaflutningurin til vinnulív og til fólk í Suðuroy og Sandoy skal tryggjast**

FARMALEIÐIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er ongin avgerð tikin um, hvussu verður við farmaflutningi til og úr Sandoy og Suðuroy, tá ið Farmaleiðir verða einskildar, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður*

Nú ætlanin er at einskilja Farmaleiðir hjá Strandferðsluni, er tað ein stórur spurningur, hvussu verður við farmaflutninginum til og úr Sandoy og Suðuroy og flutninginum ímillum bygdirnar í hesum báðum oyggjum.

Tað ásannar, Jógvan við Keldu.

Hann er landsstýrismaður í innlendismálum og sostatt hevur hann høvuðsábyrgdina av einskiljingini.

Á samferðslufundi í Vági mánakvøldið reisti Johan Dahl spurningin og vísti á, at hann fór ikki at góðtaka eina einskiljing, sum ikki hevði flutningsskyldu við sær, so at virki í útjaðaranum ikki fóru at verða verri fyri enn tey eru nú.

– Tá ið Farmaleiðir eru einskildar, skal tað framvegis bera til hjá virkjum í útjaðaranum at keypa smáar nøgdir av fiski og fáa tey flutt til virkið, líka ómakaleyst sum nú, segði hann.

### Ongin avgerð tikin

Landsstýrismaðurin í innlendismálum ásannar, at enn er ongin avgerð tikin um flutningin til útjaðaran og í útjaðaranum.

Men hann sigur, at tað er eitt mál, sum tað verður arbeitt við.

Hann vísir á, at tað hevur verið tosað í minst 20 ár um at einskilja Farmaleiðir og tá ið tað ikki hevur eydnast enn, er tað sjálvsagt tí, at hetta hevur nakrar trupulleikar við sær, sum ikki eru lættir at loysa.

– Men Kappingarráðið hevur staðfest, at tað er ólógligt hjá tí almenna at føra kappingaravlagandi virksemi á einum marknaði, sum tað privata røkir og tí er neyðugt at einskilja Farmaleiðir.

Hinvegin sigur hann, at tað er avgjørt, at ein serskipan skal finnast fyri Suðuroynna og Sandoynna, so at virksemið har kann halda fram uttan at verða tarnað.

– Vit ætla at tryggja, at vinnulívið í Suðuroy og í Sandoynni fær umstøður at arbeiða á jøvnum føti við vinnulívið aðrastaðni. Tað er sera umráðandi at tryggja, at vinnulívið í Suðuroy og Sandoy ikki fær arbeiðsumstøður, sum eru kappingaravlagandi afturímóti vinnuni í Føroyum annars. Men samstundis skal tað skipast so, at Kappingarráðið kann góðtaka skipanina.

– Akkurat, hvussu tað skal gerast, er støða ikki tikin til enn. Men eg meti, at onkrar treytir fara at fylgja við einskiljingini.

Men hvørjar hesar treytir verða, fær hann onki sagt um enn.

### Mangla útrokningar

Hann staðfestir kortini, at Farmaleiðir hevur onga lógarbundna flutningsskyldu.

– Strandferðslan hevur flutningsskyldu á sjónum, men á landi hevur hon í mong ár arbeitt, sum um at Farmaleiðir eisini høvdu eina flutningsskyldu og sostatt er ein siðvenja upparbeitt á hesum øki. Men lógarfest er tað ikki, staðfestir Jógvan við Keldu.

Hann sigur eisini, at skal flutningurin skipast akkurát sum hann er nú, er spurningurin, hvat er vunnið við einskiljingini.

– Tað er ein útrokning, sum ikki er gjørd enn, sigur landsstýrismaðurin.

Hann leggur kortini afturat, at ein týðandi táttur í royndini eftir at javntseta vinnulívið í Suðuroy við restina á landinum, er, at í allarnæstu framtíð, verða farmagjøldini við Smyrli lækk að munandi, so at tað ikki verður d‡rari hjá vinnuni at fáa vørur til og frá, enn tað er hjá virkjum aðrastaðni í landinum.

Hinvegin harmast hann um, at av tí at ein serskipan verður gjørd fyri Sandoy og Suðuroy, fer tað at forða privata fyritaksseminum í hesum oyggjum at fóta sær í hesi vinnugreinini.

# Klára seg betur sjálvt um oljan er nógv dýrari

**Hvørt húski skal nú betala yvir 500 krónur meiri til olju og brennievni til bilin, enn tey gjørdu fyri hálvum øðrum ári síðani. Men lønin er hækkað enn meiri, so oljan er sum so ikki orsøkin til at nógv húski eru sperd**

OLJUPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Olja og brennievni til hús og bilar er dýrkað nógv í seinastuni, men lønin er hækkað enn meiri, so enn halda húsarhaldini tørn, sigur fíggjamrálaráðið*

Hóast oljan er dýrkað nógv í seinastuni, er tað ikki orsøkin til, at nógv húski eru sperd í dag.

Tað staðfestir Fíggjarmálaráðið.

Ráðið sigur í eini útrokning, at hóast oljan er dýrkað rættiliga nógv, er lønin hækkað enn meiri og tí er oljuprísurin einsamallur ikki orsøkin til, at keypiorkan hjá fólki minkar.

Løgtingið viðgerð í løtuni eitt uppskot frá miðflokkinum um at broyta umstrídda oljuavgjaldið, so at tað aftur verður til tað, sum tað var fyrr.

Fyrr hækkaði og lækkaði oljuavgjaldið, alt eftir hvussu prísurin í oljuni var. Dýrari oljan var, lægri var oljuavgjaldið og bíligari oljan var, hægri var oljuavgjaldið.

Men síðani var oljuavgjaldið ásett at vera 80 oyru fyri liturin, sama um oljan var bílig ella dýr.

### Oljan hækkað nógv

Í løtuni er oljan so dýr, at verður uppskotið hjá miðflokkinum samtykt, hevði onki oljuavgjald verið.

Í hesum sambandi hevur Fíggjarmálaráðið roknað út, hvat hækkingin í oljuprísinum merkir fyri húdarhaldini og um tað hevur ført til eitt beinleiðis fall í keypiorkuni, at oljan er dýrkað so nógv.

Fíggjarmálaráðið sigur, at verður hugt eftir prístalinum, sæst at prísvøksturin hevur verði 5,1% síðani 2001.

Tó hevur vøksturin verði størri í seinastuni. Síðani fyrsta ársfjórðing í 2004 er prístalið hækkað 3,5%.

Prístalið fyri brenniolja til hús er frá 1. ársfjórðingi 2004 farin frá 92,1 stigum, upp í 141,3 stig í 3. ársfjórðing í ár.

Hetta er ein vøkstur upp á 53,4%. Í prístalinum vigar hesin vørubólkur 3,9%

Prístalið fyri brennievni og smyrjolju til bilar er frá 1. ársfjórðingi 2004 hækkað úr 87,5 stigum til 108,6 stig í 3. ársfjórðingi í ár.

Hetta er ein vøkstur upp á 24,1%. Í prístalinum vigar hesin bólkur 3,1%

Fíggjarmálaráðið sigur, at hetta merkir, at eitt húsarhald sum 1. ársfjórðing í fjør brúkti 800 krónur um mánaðin til brenniolju til sethús og 600 krónur um mánaðin til brennievni til bil, noyðist nú at brúka einar 1.230 krónur um mánaðin til brenniolju til sethús og einar 745 krónur til brennievni til bilar.

Hetta svarar til eina meirútreiðslu upp á einar 575 krónur um mánaðin.

### Lønirnar hækkaðar enn meiri

Prístalið vísir prísgongdina í miðal og tí er hetta eitt eitt mát fyri, hvussu vøksturin í oljuprísinum í miðal ávirkar nýtsluna hjá húsarhaldunum.

Men so sigur Fíggjarmálaráðið eisini, at í sama tíðarskeiði eru lønirnar hækkaðar eini 7,5%.

– So verður bara hugt eftir prísvøkstrinum á brennievni, kann ikki sigast, at talan hevur verið um reallønarlækking, sigur fíggjarmálaráðið.

Miðflokkurin sigur, at verður teirra uppskot samtykt, verður talan um ein munandi lætta og tað er ein lætti, sum kemur láginntøkunum mest til góðar

Tí mæla teir til, at ein partur av ætlaða skattalættanum verður umlagdur so at oljuavgjaldið heldur verður umskipað, so at tað fellur burtur, tá ið oljurpísirnir eru so høgir sum nú.

Uppskotið hevur ikki stórar møguleikar at verða samtykt, tí umboð fyri allar samgonguflokkarnar og tjóðveldisflokkurin, halda ikki, at tað er grundarlag fyri at lækka oljuavgjaldið og tí mæla tey frá at samtykkja tað.

Tey halda, at hava ávísir bólkar, eitt nú pensjónistar ella húski við børnum, brúk fyri einum lætta, ber tað til at hækka barnafrádráttin og at hækka viðbótina til pensjónistar.

Tey einastu, sum taka undir við uppskotinum, eru miðfokkurin og sjálvstýrisflokkurin.